# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo

## Tey ungu senda 341 smsboð um vikuna

Tey ungu senda í miðal yvir 341 smsboð um vikuna. Tað vil siga umleið 50 um dagin. Tað er sjey ferðir so nógv smsboð, sum tey í aldursbólkinum 30-49 ár senda.

Tað eru framvegis tey yngri enn 19 ár, ið senda mest smsboð. Tað vísur ein nýggj kanning, sum TNS Gallup hevur gjørt fyri donsku telefyritøkuna TDC. Í miðal senda tey ungu 341 smsboð um vikuna. Miðaltalið fyri allar aldursbólkar er 63 sms boð. Eisini í aldursbólkinum yvir 50 ár, eru eini smsboð um dagin vanligt.

Hóast høga talið av smsboðum, er tað einki sum bendir á, at nýtslan av smsboðum er minkandi.

Sambært hálvársfrágreiðingini hjá danska IT-Telestyrelsen, vaks talið av sendum smsboðum til heilar 13 milliardir smsboð í 2008, sigur TDC við Ekstrablaði.

Í aldursbólkinum 20-29 ár er nýtslan av smsboðum 102 um vikuna, meðan aldursbólkurin 30-49 ár bert sendir 47. Í aldursbólkinum yvir 50 ár er talan um 11 smsboð um vikuna.



## Linda fær rós fyri sangin

Tað er ikki stóra showið yvir Lindu Andrews, men hon hevur eina framúr góða rødd, halda ummælarar hjá BT. Danska blaðið BT brúkar egnar ummælarar at fylgja X Factor kappingini hjá DR.

Fríggjakvøldið sang føroyska Linda Andrews seg víðari í kappingini, og hon fekk nógv rós fyri sína tryggu framførslu í sendingini.

Ummælararnir hjá BT halda, at framførslan hjá Lindu Andrews var eitt sindur keðilig, men teir halda, at hon er ein framúr góður sangari.

- Eg kann bara siga, at Whitney Houston, Cline Dion og Mariah Cary hava fingið eina vinkonu, sigur Kenny Aleksandr, sum er ein av ummælarunum hjá BT. Linda Andrews skal aftur í eldin í X Factor fríggjakvøldið.

## Stuðla Lindu á Facebook

Linda Andrews hevur ein sokallaðan fanklubb á Facebook, har umleið 1.800 fólk hava víst sín stuðul.

Facebook hevur veruliga sett síni spor kring heimin, og alsamt fleiri og fleiri sokallaðir facebook bólkar verða stovnaðir hvønn dag. Millum annað kann nevnast, at ein bólkur er stovnaður undir heitinum "Føroyingar á Facebook". Føroyska songkvinnan Linda Andrews er eisini komin í Facebookheimin, og ein bólkur, við umleið 1.800 limum, er stovnaður til æru fyri hennara luttøku í X-Factor. Bólkurin nevnist FANCLUB Support Linda Andrews in X-Factor, og fjepparanir í bólkinum eru frá ávikavist Føroyum, Danmark og Íslandi.

## Tórhild Bjarkhamar við nýggjari fløgu

"Saman við tær" er heitið á nýggjari gospel-fløgu, sum Tórhild Bjarkhamar í Leirvík hevur givið út. Á fløguni eru 10 løg á føroyskum og enskum.

Hetta er fyrsta fløguútgávan hjá Tórhild Bjarkhamar, sum við ljósu rødd síni framførir bæði kendar og ókendar sálmar og gospelløg. Í einum av sangunum, "Maria visti tú?" fær hon hjálp av kendu songkvinnuni Eivør Pálsdóttir.

Fløgan er tikin upp í Kris-stuff STUDIO. Tónleikarar eru: Gunnar Guttesen, klaver, strúkara og harmonika, Niclas Johannesen, akustiskan gittara og el gittara, Kristoffer Mørkøre, bass, loops og slagverk, Brandur Jacobsen, trummur og Jákup Zachariassen, steel, dobro og akustiskan gittara.

Tórhild Bjarkhamar er 46 ára gomul og født og uppvaksin Leirvík. Hon er útbúgvin lærari og starvast í løtuni sum málsviðgeri í Barnaverndartænastuni hjá Klaksvíkar kommunu.

Í sambandi við fløguútgávuna verður útgávukonsert í Kelduni í Skálafirði, fríggjakvøldið 27. februar klokkan 19.30.

## Hvonn aftur karmur um livandi jazz tónleik

Hvonn hevur latið hurðarnar upp fyri jazz tónum hvørt týskvøld í nærum eitt ár, og samstundis hevur Hvonn Lounge gjørt stórar íløgur. Tey hava millum annað keypt eitt klaver og eitt nýmótans ljóð anlegg, soleiðis at umstøðurnar hjá tónleikinum eru so góðar sum til ber.

Týskvøldið er so aftur jazzur á Hvonn. Hesaferð er tað Heðin Ziska Davidsen, ið leikar á guitar, Mikael Blak, ið leikar á bass, Óli Olsen, ið leikar á klaver og Brandur Jacobsen ið leikar á trummir.

Heðin er serliga kendur sum guitarleikarin í Yggdrasil og Hatespeech, men hevur eisini sín egna bólk, ið nevnist Tjant. Tjant hevur útgivið tvær fløgur, og nevnast kann, at Mikael, Brandur og Óli eisini eru partur av bólkinum.

Mikael er bassistur í 200, fastur bassistur hjá Teitur Lassen eins og hann eisini er partur av Yggdrasil.

Óli Olsen er serstakliga væl kendur úr bólkinum Enekk, men tað farna árið hevur hann eisini verið partur av bólkinum Crawling Blue, ið fer at geva út fløgu síðst í mars í ár.

Brandur Jacobsen er ein sera virkin trummuleikari. Hann er partur av bólkinum Yggdrasil, Crawling Blue, fastur trummuleikari hjá Høgna Lisberg eins og hann hevur útgivið tvær fløgur í egnum navni.